## Fegin um stigini

Skotski liðskiparin, Barry Ferguson, staðfesti eftir dystin, at skotar vóru fegnir um stigini, sum teir fingu. – Vit søgdu undan dystinum í Eysturríki, at stigini høvdu størsta týdningin av øllum. Vit hava tvær ferðir upplivað sannar marrur her, so vit eru fegnir um sigurin. Eg veit væl, at føroyingarnir millum annað raktu yvirleggjaran, men teir hóttu jú eisini Italia, segði Barry Ferguson við skotska Daily Record.



## Ferðslan gekk sum smurt

Mest sum øll løgreglan í Føroyum var á Svangaskarði mikukvøldið. Summir teirra enn tá á vøllinum. Tað gav at bíta í Runavík, har satt ferðslukaos var við rundkoyringina. Men tá eingin løgregla var, so máttu fjeppararnir bara sjálvir taka málið í egnar hendur. Og tá hesin landsliðskenningurin fór út at stýra bilunum, gekk aftur sum smurt, soleiðis at tey flestu komu rættstundis til dystin.

# Gev Christiani sessin

**Fremsta orsøkin til, at føroyska spælið hekk somikið væl saman í álopspartinum, var Christian Lamhauge Holst. Lyngby-spælarin hótti, dribladi og tacklaði seg inn í føroysku hjørtuni á Svangaskarði. Og tá restin av liðnum eisini fylgdi við eftir steðgin, átti og skuldi úrtøkan verið størri og betri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Christian Lamhauge Holst vísti snøgt sagt altjóða støði í føroyska álopsspælinum. Eftir mikukvøldið kann eingin ivi vera um, hvør eigur fremsta plássið á føroyska landsliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**1. Jákup Mikkelsen, B36, 50 landsdystir/0 mál**

Kundi kanska stillað múrin og seg sjálvan betri við fyrra skotska málið, tó at frísparkið var væl skotið. Hevði annars nakrar týðandi bjargingar. Millum annað eina framúrskarandi bjarging, sum tíverri fór út til blankan mótstøðumann til 2-0 málið. Var annars tryggur við beinunum, og hevði sum heild ein dyst av meðal dygd.

**4. Atli Danielsen, Frem, 21/0**

Hevði stórar trupulleikar fyri steðgin, tá hann á vinstra bakki ofta gav mótstøðumanni sínum ov gott pláss. Og var á hendan hátt partur av orsøkini til 2-0 málið. Treivst munandi betri, tá hann varð fluttur á høgra bakk, og var tá við í nógvum av skapandi føroyska spælinum. Hevði tó eina sera vandamikla dribling, tá hann misti bóltin til tríggjar skotar.

**5. Jón Rói Jacobsen, AaB, 27/0**

Byrjaði dystin á høgra bakki, og stóð seg rættiliga væl á plássinum, so skotar ikki sluppu ígjøgnum uttan víðari. Varð fluttur í miðverjuna, tá Óli mátti skiftast út, og prógvaði tá enn einaferð, at hann er framtíðar maðurin til plássið. Vann nógvar bóltar í luftini, og á spælinum á jørðini var tað ein fragd at síggja, at hann aftur er við at finna góða bóltreygað, so bólturin ofta kundi stjalast heldur enn tacklast.

**6. Rógvi Jacobsen, HB, 44/8**

Hesa ferð skuldi hann í minsta lagi javnað málmetið hjá Toda. Var annars við í nógvum, og hóast Weir var eins óhugnaliga sterkur í loftspælinum, var Rógvi við í nógvum. Serliga tá hann leitaði aftur miðvøllin, har hann heldur ikki datt ímillum leikliga. Millum annað tá hann hegnisliga spældi Jákup á Borg leysan.

**7. Fróði Benjaminsen, B36, 43/2**

Hevði nøkur ivandi moment í spælinum fyri steðgin, tá bólturin onkra ferðina ikki varð ruddaður nóg væl. Lyfti seg saman við liðnum høgt upp eftir steðgin, tá hann saman við Jón Róa var trygdin fyri, at føroyingar kundu flyta spælið longur niðan á vøllin. Og er eisini somikið sterkur í avspælinum, at bólturin sjáldan varð givin burtur.

**8. Mikkjal Thomassen, B36, 6/0**

Var uttan iva ein sera týðandi orsøk til stórspælið, sum Súni Olsen sýndi. Við kropsligu styrkini megnaði hann støðugt at vinna leysu bóltarnar í miðvøllinum, eins og hann alla tíðina royndi at vera spælbærur. Og við taktiska medvitinum riggaði hann sera væl sum sweepari á miðvøllinum, tá føroyska liðið skifti til at spæla við veruligum diamanti á miðvøllinum.

**9. Jákup á Borg, HB, 51/1**

Fram eftir vøllinum tykist tað, sum hevur Jákup í løtuni ilt við at finna sera høga støðið, sum hann áður hevur sýnt. Kanska eisini tí hann hevur verið argaður av einum lærskaða nú í longri tíð. Men í verjupartinum var talan um megnaravrik, har hann støðugt skermaði av fyri skotskum uppspæli. Átti ein tann størsta føroyska møguleikan, tá hann varð stungin leysur av Rógva, men misnýtti við vinstra beini.

**10. Christian Høgni Jacobsen, HB, 35/2**

Var mest sum púra anonymur í fyrra hálvleiki, tá millum lítið og einki vildi bera til. Var tó maðurin, sum við tveimum góðum gjøgnumbrotum skelkaði skotar og vísti føroyingum veg, tá gongd kom á eftir steðgin. Megnar hann at halda avrikið á støðinum, sum hann sýndi seinastu trý korterini, er eingin sum helst ivi um, at hann framhaldandi heldur plássið á kantinum.

**13. Óli Johannesen, TB, 82/1**

Avgjørt ikki ein av dystunum, sum Óli fer at minnast við størstu gleðini. Skuldi helst ikki verið komin á vøllin aftur, tá hann fekk ein snudd, men valdi kortini at royna. Átti frísparkið, sum gav fyrra skotska málið, og tóktist passivur við seinna málið. Noyddist at enda at gevast, tá skaðin vísti seg størri enn viljin.

**14. Christian Lamhauge Holst, Lyngby, 6/0**

Við avriki sínum kravdi Lamhauge-maðurin, at hann skal vera fremsta val til álopssessin. Kropsliga og tekniskt eru dygdirnar somikið stórar, at hann støðugt var maðurin, sum megnaði at fáa uppspælið á seinasta triðinginum á vøllinum at hanga saman, sum tað ongantíð hevur gjørt áður. Staðfesti greitt, at hann hevur superligustøði, og var snøgt sagt besti føroyingurin á vøllinum, um hugt verður eftir samlaða avrikinum.

**19. Súni Olsen, AaB, 28/1**

Var Christian besti maður, so var Súni eins klárt tann næstbesti. Sýndi í glottum fyri steðgin, hvat hann er førur fyri, men veruligu góðbitarnir komu eftir steðgin. Hevur spælskil og bóltførleika sum fáur. Ikki minst tí hann er somikið sterkur við báðum beinum. Ein eginleiki, sum ger, at mótstøðan ikki fær læst hann í nærdystum. Átti eisini eina freka frísparksroynd, sum mundi givið mál av sær.

**3. Marni Djurhuus, EB/Streymur, 6/0**

Kom inn fyri Óla, og megnaði hampuliga væl at lukka av í sínum borði. Sterka síða hansara er fyrst og fremst verjuparturin, og tí varð hann offraður, tá føroyska liðið eftir steðgin flutti spælið alt longur niðan á skotsku hálvuna.

**11. Andrew av Fløtum, Fremad Amager, 23/1**

Fekk seinastu 8 minuttirnar á vøllinum, og fall alt fyri eitt inn í spælið. Ein eginleiki, sum er nógv verdur hjá innskiftara. Hesa ferð verður hann tó fyrst og fremst mintur fyri avbrennaran, tá hann púrasta leysur við málverjanum kundi staðfesta, at hetta skuldi ikki verða okkara dagur.

**15. Símun Samuelsen, Keflavík, 11/1**

Fekk seinastu 11 minuttirnar á vøllinum, tá Jógvan Martin valdi at satsa. Kom tó sjáldan veruliga við í spælið, og kann avrikið tí illa dømast.